

Johan Petersen

# Politisk søguskriving

Sjálvsstýris- og loysingarmenn hava ein veikleika fyri at manipulera við søguligum tilfaritil egnan fyrimuns. Setur tú spurnartekin við teirra søgufatan, blíva teir firtnir. Í svari avdúkar Hans Andr. Sølvará, at hansara søguskriving onki undantak er í so máta. Ja, hann ger enntá klassisku deyðssyndina, at meta søguligt tilfar út frá nútíðar viðurskiftum í staðin fyri, at meta søguna út frá síni samtíð

Í drúgvum svar til fyrispurning mín til Hans Andr. Sølvará, um hvussu hann sum søgufrøðingur kann leggja navn til løgtingssøguna, har hann í sera stóran mun viðger politiska virkisemið hjá Jóannesi Patursyni, meðan samtíðar- og mótstøðumaður hansara, Andras Samuelsen, nærum ikki verður nevndur, og hvar ið hansara fakligi stoltleiki sum søgufrøðingur er, nýtir HAS fyri ein stóran part politisk argument fyri at rættvísgera sína søguskriving.

## Politiskt kannustoyparí

Ja, hann fer enntá so langt, at hann loyvir sær politiskt kannustoyparí, tá hann hugleiðir um, hvussu føroyska samfelagið hevði sæð út, um Sambandsflokkurin framvegis hevði ta undirtøku, sum hann hevði undan 2. heimsbardaga. Og hetta ger hann á ein hátt, sum vit kenna tað aftur frá loysingarpolitikarum.

Eisini tykist HAS at blíva firtin, tí eg skal hava lagt eftir honum persónliga. Men tað er sum so mangt annað, hann sigur meg hava skrivað, skeivt. Eg kenni ikki HAS og havi sett spurning mín til søgufrøðingin HAS og spurt eftir hansara fakligа stoltleika. Harí liggur onki persónligt.

## Ikki løgtingssøga, men sjálvstýrissøga

Fari ikki í politiskt kjak við søgufrøðing, men skal tó takka honum fyri, at hann – hóast sera innballað – viðgongur, at hann hevur lagt dent á søguna hjá sjálvstýrisrørsluni, og at hansara bók ikki ber sum søguligt keldutilfar. Bert spell, at søguverkið ber heitið løgtingssøgan. Tað átti sjálvandi at itið sjálvstýrissøgan. Og gott, at eg bert í lítlan mun havi nýtt søguverk hansara sum keldutilfar, men mest løgtingstíðindi.

## Klassiska deyðsyndin

Men sæð í søguligum ljósi er tað skelkandi, at søgufrøðingurin ger viðmerkingar, har hann ger klassisku deyðsyndina ikki at seta søguna í samtíðarperspektiv.

Hann tulkar úrslitið av fólkaatkvøðuni í ´46 sum sjálvstýris- ella loysingarmaður og sær burtur frá ógildigum atkvøðum. Á henda hátt fær hann – hokus pokus - so sum aðrir loysingarmenn fleirtal fyri loysing.

Hevði hann hugsað sum søgufrøðingur, hevði hann spurt seg sjálvan, hví heili 4 % av atkvøðunum vóru ógildugar. Vanliga liggur hetta tal undir eini hálvari promillu. Við fólkaatkvøðuna var talan sostatt um nærum 100 ferðir fleiri ógildugar atkvøður, enn vanligt. Hetta svarar til, at tað ikki bert vóru 18 atkvøður, sum vóru ógildugar við seinasta løgtingsval, tá Føroyar vóru eitt valdømi, men út við 1300! Og tað má hava eina orsøk.

## Samtíðarorðaskifti stóra ávirkan

Og tað hevur tað eisini. Orðaskiftið undan fólkaatkvøðuni er sjálvandi orsøkin og harvið "nei"-atkvøðurnar. Hetta vóru í hvussu so er ikki loysingaratkvøður, líka so lítið sum tær vóru atkvøður fyri stjórnaruppskotinum.

HAS hevur púra rætt, tá ið hann sigur, at tað ongastaðni í lógaruppskotinum, sum fólkaatkvøðan bygdi á, stóð, at tað kravdist eitt kvalifiserað fleirtal fyri loysing. Men tað stóð heldur ikki, at vanligt fleirtal var nokk. Har stóð snøgt sagt onki um, hvussu fólkaatkvøðan skuldi tulkast.

Men hevur tú virðing fyri søguni, so kannar tú eftir, hvørjar umstøður vóru galdandi tá. Og tá fært tú í hvussu so er at vita, hvussu samtíðarmenninir uppfataðu fólkaatkvøðuna. Og tað má alt annað líka vera rættari enn tað, sum HAS heldur í dag.

## Føroyingar ynsktu ikki loysing

Tað framgongur týðiliga (ikki av "sjálvstýrisløgtingssøgu" HAS´s, men av løgtingstíðindum), at bæði Andras Samuelsen og Thorstein Petersen uppfataðu fólkaatkvøðuna sum leiðbeinandi, og at Thorstein Petersen harafturat uppfataði tað so, at kvalifiserað fleirtal var neyðugt.

Tað kann tí ikki vera rætt, tá ið HAS og aðrir loysingarmenn halda, at reint formliga atkvøddu føringar fyri loysing, tá ið Andras Samuelsen og Thorstein Petersen ikki uppfataðu tað soleiðis undan atkvøðuni.

Tí var tað sjálvandi púra rætt, tá ið kongur sendi tingið til hús og nýval bleiv útskrivað. Og tað valið beindi burtur allan iva. Føroyingar ynsktu ikki loysing.






Hans Pauli Strøm

# Set heldur nýggja javningarskipan av pensjónunum í gildi!

Byggið upp heldur enn at bróta niður – ikki bara skipanir men eisini álit millum politisku skipanina og borgararnar.

Landsstýriskvinnan í almannamálum hevur boðað frá, at hon ætlar at avtaka javningina av pensjónunum, fyri at spara pengar á almannaøkinum.

Haldi hetta vera púrasta í mótstríð við tær positivu ætlaninar, sum annars eru um hesi viðurskifti í komandi pensjónsreforminum.

Í staðin fyri at avtaka alla javningina hjá bæði fólka- og fyritíðarpensjonistum, eiga vit at seta eina nýggja javningarskipan í gildi, sum tryggjar, at pensjónirnar bæði fylgja við broytingunum í sáttmálalønunum og við prístalinum. Hetta kann t.d. gerast soleiðis, at fyri komandi ár verður útroknað eitt javningartal, sum er eitt miðaltal av lønar- og prísvøkstrinum árið fyri.

Sum nú er verður bert viðbótin í fólkapensjónini javnað við 3%. Grundupphæddin, sum er tann størri parturin av fólkapensjónini, verður als ikki javnað. Hetta merkir, at samanlagda fólkapensjónin bert verður javnað við umleið 1,25%. Hjá fyritíðarpensjonistum verður øll pensjónin javnað við 3%.

Hvat hevði hetta blivið, um nevnda uppskot um eina nýggja javningarskipan hevði verið galdandi í dag? Tvs. um vit ásettu javningina av pensjónunum í 2010 eftir einum miðaltali av lønarhækkingini og prístalinum í 2009?

Hækkingin av lønarsáttmálunum, sum í fjør varð innløgd í galdandi fíggjarlóg, er 3%.

Viðv. prístalinum minkaði ársmiðalprístalið úr 116,7 í 2008 til 115,5 í 2009. Tvs. ein broyting uppá -1,0%.

Eitt miðaltal av lønarhækking og broyting í prístalinum hevði sostatt verið miðaltalið av 3% og -1%. Javningartalið fyri 2010 hevði eftir hesum blivið 1%.

Hvussu hevði hetta sama kunna verið fyri komandi ár? Altso, ístaðin fyri at avtaka alla javningina.

Taka vit sáttmálan á privata arbeiðsmarknaðinum sum dømi, so fingu tey eina hækking (í løn + eftirløn) uppá 3,8% yvir 2 ár. Svarandi til 1,9% árliga.

Taka vit prístalið, kenna vit higartil bert 1. ársfjórðing í 2010, men samanbera vit við 1. ársfj. Í 2009, so er prístalið fallið úr 116,1 niður í 115,2. Tvs. Ein broyting uppá -0,8%.

Eitt miðaltal av broytingini í lønarsáttmálum og prístalinum hevði tí verið 0,55%.

Høvdu vit eitt annað ár havt ein lønarvøkstur uppá 2% og prístalsvøkstur uppá 3%, so hevði javningartalið av pensjónunum verið miðal av tí, nevnliga 2,5%.

Á henda hátt hevði man tryggjað sær, at pensjónirnar altíð fylgdi teirri gongdini í samfelagnum, sum avmyndast í lønar- og príshækkingunum.